MÁLTEIGURIN

Tey penu orðini

Føroyskt hevur nógv orð fyri tann ella tað, sum á ein positivan hátt líkst burtur úr í útsjónd. Vit kunnu nevna *vegligur, friður, vænur, fagur, vakur* og fleiri onnur orð. Og so hava vit *penur*. *Penur* man enn vera tað vanligasta orðið í gerandismálinum, og tað man ikki vera sørt, at *penur* og *vakur* verða uppfatað sum synonym, ið hoyra heima ávikavist í talaðum og skrivaðum máli. Fá munnu duga at hugsa sær, at nakar sang *»Hvørjum man tykjast pent hjá sær...«* (burtursæð frá at rytman ikki passar). Men tað man heldur ikki vera serliga trúligt, at ein vinkona fortelur einari aðrari, at tey hava fingið ein *»So vakran bil fyri lítið og einki!«*

Tí ivaleyst er tað rætt, at í predikativum bróki *»hon er pen«* er *pen* tað sama sum *vøkur*, sum kann setast ístaðin, men ein stilistiskur munur er kortini.

Men tekur ein kona til, tá maðurin kemur sløðrandi til hús seint á nátt, *»Nú ert tú penur!«*, er tað kanska ironiskt brók av orðinum, men *vakur* kann ikki setast ístaðin.

Og *penur* hevur eisini nakrar heilt aðrar týdningar sum hava lítið og einki við útsjónd at gera og sum *vakur* slett ikki hevur.

Boðsháttur *»Ver nú pen!«* er ikki ein ordri til at friðkast (so skuldi tað næstan eisini itið *»Verð nú pen«*), men boð um at skikka sær væl. Og tá onkur hevur á munni *»Tað er pent, er tað!«*, er hetta sum kunnugt ikki petti rósandi meint.

Tá stik varð sett upp um tað skrivaða málið fyri einum hundrað árum síðani ella so, varð stikið gjørt so tætt, at stórt tal av orðum mátti standa so nipin uttanfyri og bína. Og ikki bara vargar, men eisini hampaorð, sum høvdu verið í ti føroyska orðafylginum í nógv Harrans ár.

Vit eiga at lova hesum útistongdu orðunum innaftur. Vit hava brúk fyri øllum týdningsmunum og nuansum. Vit hava brúk fyri at kunna siga ella skriva um okkurt, at tað er *fagurt*, men vit hava eisini brúk fyri orðinum *penur*. Við at úthýsa sovorðnum orðum gera vit skriftmálið fátækari.

Sjálvandi er *penur* av fremmandum, allarhelst fronskum, uppruna. Men orð sum *kot* og *vestur* eru eisini komin til okkara úr fronskum, og eg havi ongan hoyrt noktað fyri at fara í føroysk klæði fyri tað.

P-v

Við hesum verður sagt frá, at kæra mamma, omma og langomma okkara

GUNHILD MOURITSEN
fødd Reinert

doyði 30. mai, 83 ára gomul á Vistarheiminum í Runavík.


Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju sunnudagin kl. 14.00. Sungið verður úr sálmabókini.

Fyri tey avvarðandi
Ásfríð og Sváva

Íbúð á Berjabrekku til sølu


Íbúðin, sum er væl hildin, er innrættað soleiðis: Durur, gangur, stova/køkur, 2 kømur og baðirúm. Íbúðin er 67 m² til støddar í einari hædd + hjall. Eisini er altan. Útsýni er gott. Áhugað kunnu síggja íbúðina við at ringja

Tlf. 18332



KROSSORÐAGÁTA

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: SEYÐARAKSTUR



Hvønn leygardag verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein av niðanfyri nevndu bókum frá Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í *seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. ____«** á bjálvan.

Vinnari: Jóna Johannesen,
Eirargarður 8-101
100 Tórshavn

Loysunarorð: **67**

Navn

Bústaður

Bygd/býur

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

- ❑ **Fuglar í Norðurhøvum**
- ❑ **Stjórnarskipanarmálið 1946**
- ❑ **Spell at sólin kom upp**
- ❑ **Politiska søga Føroya 1814–1906**
- ❑ **Føroyskir soppar**
- ❑ **Døgurðabókin**
- ❑ **Søgan um eplið**
- ❑ **Heimsatlas**
- ❑ **Mannakroppurin – og hvussu hann starvar**
- ❑ **Alfagurt ljóðar mín tunga (fløga/ljóðband)**

Bøkur og annað tilfar
– bæði innan og uttan skúlagátt.

FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNUR